LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 23. september 2024
J.Nr.: LUM-16- 24/12012-30
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

# Álit
## um mannagongd og fyrisiting hjá Umhvørvismálaráðnum í sambandi við góðkenning av byggisamtyktum

## 1. Niðurstøða umboðsmansins

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um mannagongd og fyrisiting hjá Umhvørvismálaráðnum í sambandi við góðkenning av byggisamtyktum.*
*Umboðsmaðurin var ikki samdur við Umhvørvismálaráðnum í, at ráðið ikki skuldi taka støðu til innihaldið í býarskipan og byggisamtykt í eini kommunu í sambandi við broyting av byggisamtykt. Umboðsmaðurin helt, at slík avmarkandi tulking av heimildunum hjá landsstýrismanninum ikki var í samsvar við býarskipanarlógina. Umboðsmaðurin vísti á, at býarskipanarnevndin, sambært lógini, var ætlað at vera ein faklig nevnd, sum letur landsstýrismanninum faklig ummæli. Umboðsmaðurin helt í hesum sambandi, at avmarkaða málslýsingin hjá ráðnum í einum undirliggjandi máli, vísti á eina ónøktandi mannagongd hjá ráðnum viðvíkjandi upplýsing av málum um broyting av byggisamtykt. Umboðsmaðurin ásannaði, at ráðið hevði fylgt síni avmarkandi tulking í fleiri ár, men vísti á, at um ráðið vildi halda fast við ikki at fremja nakra realitetsviðgerð í málum viðvíkjandi broyting av byggisamtyktum, eigur hetta at framganga greitt av lógini.*

## 2. Klagan

Við skrivi, dagfest 8. mai 2024, sendi A soljóðandi klagu:

> "Undirritaði fer við hesum at kæra Umhvørvismálaráðið fyri ikki at fyrisita løgtingslóg um byggi- og býarskipanir á rættan og lógligan hátt.
> Í samband við góðkenning av byggisamtyktum er Umhvørvismálaráðið farið at umsita økið á ein heilt øðrvísi *(hátt, mín viðm.)* enn tað, sum lógin fyriskrivar.
> Undirritaði hevur eisini ... vitan um, hvussu góðkenningarprocessin fyrr hevur verið í landsstýrinum.
> Tann praksis, sum Umhvørvismálaráðið nú virkar eftir, er púra nýggj - hóast løgtingslógin, sum ráðið umsitur, er frá 1954!
> Havi eisini havt fyrispurningar hjá advokatum um hesa nýggju mannagongd, og aftursvarið er, at teir bara rista á høvdinum.
> At Umhvørvismálaráðið, sum góðkennandi myndugleiki í samband við byggisamtyktir, bert útinnur eitt sokalla "legalitetseftirlit" er púra burturvið.

Løgtinglógin hevur í § 6 hesa áseting:

> § 6. Áðrenn uppskot um byggisamtykt verður sent landsstýrismanninum, skal tað verða lagt fram í minsta lagi 3 vikur til alment eftirlits á einum fólki atkomuligum staði. Kommunan skal frammanundan á vanligan hátt kunngera, at byggisamtyktin er framløgd til eftirlits, og kunngerðin skal skila til, hvørt økið tað er, ið uppskotið umfatar. Mótmæli móti uppskotinum, og broytingaruppskot mega verða send kommunustýrinum, áðrenn 6 vikur eru lidnir frá kunngerðardegnum.
> Stk. 2. Innkomið mótmæli og broytingaruppskot, sum kommunustýrið ikki tekur við, skulu fylgja við uppskotinum, tá ið hetta verður sent landsstýrismanninum til góðkenningar.
> Stk. 3. Landsstýrismaðurin kann, tá ið mett verður, at eitt uppskot eigur at verða broytt í einum ella fleiri førum, áðrenn tað kann verða góðkent, gera av, at kommunustýrið av nýggjum skal leggja uppskotið við teim ætlaðu broytingum fram til alment eftirlits aftaná kunngerð eftir reglunum í stk. 1.
> Stk. 4. Somuleiðis kann kommunustýrið, tá ið tað, orsakað av innkomnum mótmælum ella broytingaruppskotum, hevur samtykt at broyta hitt upprunaliga uppskotið, fáa í lag, at uppskotið við hesum broytingum verður framlagt av nýggjum.
> Stk. 5. Viðvíkjandi uppskotum, ið viðgjørd verða eftir reglunum í § 4, stk. 4, avger landsstýrismaðurin, nær og hvussu hesi uppskot skulu verða framløgd til eftirlitið umrøtt í hesi grein.
> Stk. 6. Landsstýrismaðurin kann í heilt serligum førum, eftir áheitan frá kommunustýrinum, taka avgerð um at víkja frá ásettu freistum í stk. 1, soleiðis at framløgutíðin verður ásett til 1 viku og mótmælisfreistin til 1 viku frá kunngerðardegnum. Við áheitanini skal grundgevast fyri, hvørji týðandi samfelagslig og vinnulig atlit tala fyri, at umsóknin kann verða gingin á møti. Verður áheitanin gingin á møti, skal kommunan beinleiðis og persónligt kunna teir borgarar, ið beinleiðis verða ávirkaðir av broytingini, um hetta í seinasta lagi dagin eftir, at frávikið er givið.
> Stk. 7. Kærur sambært § 10 a um loyvir, ið eru givin við heimild í byggisamtykt, sum er fevnd av stk. 6, hava ikki steðgandi virknað.

Av hesum framgongur, at landsstýrið er góðkennandi myndugleikin.
Tá landsstýrið skal góðkenna eina byggisamtykt, skal landsstýrið sjálvsagt eisini fyrihalda seg til konkreta innihaldið í byggisamtyktini.

Niðurstøðan hjá Umhvørvismálaráðnum, sum er hendan:

> Tað er kommunustýrið, sum sendir Umhvørvismálaráðnum byggisamtykt til góðkenningar, tá kommunan er liðug við fyriskrivaðu viðgerðina av málinum. Umhvørvismálaráðið eftirkannar síðani, um formligu viðurskiftini í sambandi við kommunalu viðurskiftini eru í lagi, og eru tey tað, góðkennir Umhvørvismálaráðið byggisamtyktina

er púra skeiv og í stríð við lógina.

Við slíkari praksisbroyting stendur borgarin uttan nakra sum helst rættartrygd.
Umhvørvismálaráðið kannar bara um formligu reglurnar eru yvirhildnar. Eru tær tað, so verður byggisamtyktin góðkend.
Tað er sjálvsagt, at tá serkøn nevnd skal meta um byggisamtyktina og eisini innihaldi í henni, so er hesin nýggi praksis hjá Umhvørvisstovuni púra við síðuna av.
Av nevndu lógargrein framgongur m.a.

> Stk. 2: Innkomið mótmæli og broytingaruppskot, sum kommunustýrið ikki tekur við, skulu fylgja við uppskotinum, tá ið hetta verður sent landsstýrismanninum til góðkenningar.

Hetta kann ikki skiljast á annan hátt, at landsstýrið má fyrihalda seg til konkreta innihaldið í teimum kærum, sum eru sendar kommununi. Um landsstýrið er ætlað bara at hava eitt legalitetseftirlit, hevði tað verið meiningsleyst at ásett, at kærurnar skula sendast landsstýrinum.

> Stk. 3. Landsstýrismaðurin kann, tá ið mett verður, at eitt uppskot eigur at verða broytt í einum ella fleiri førum, áðrenn tað kann verða góðkent, gera av, at kommunustýrið av nýggjum skal leggja uppskotið við teim ætlaðu broytingum fram til alment eftirlits aftaná kunngerð eftir reglunum í stk. 1.

Henda lógargrein ásetur beinleiðis, at Umhvørvisstovan skal viðgera materiella innihaldið í teirri byggisamtykt, sum ráðið fær til góðkenningar. Umhvørvisráðið skal nevniliga meta um innihaldið og kann gera av, at broyta uppskotið, ella senda tað aftur til kommununa til nýggja viðgerð.

> Stk. 4. Somuleiðis kann kommunustýrið, tá ið tað, orsakað av innkomnum mótmælum ella broytingaruppskotum, hevur samtykt at broyta hitt upprunaliga uppskotið, fáa í lag, at uppskotið við hesum broytingum verður framlagt av nýggjum.

Orðaljóðið í hesum reglum sigur eisini beinleiðis, at Umhvørvismálaráðið skal fyrihalda seg til materiella innihaldið í teirri byggisamtykt, sum ráðið skal góðkenna.

Eg fari at biðja Løgtingsins Umboðsmann taka hetta álvarsmál til viðgerðar beinanvegin.

Eg eri vitandi um, at landsstýrið í áratíggju hevur havt annan praksis, nevniliga eisini at viðgera materiella innihaldið í byggisamtyktini, áðrenn hon verður góðkend, herundir at landsstýrið sum góðkennandi myndugleiki – eftir tilmæli frá serkønu býarskipanarnevndini – eisini sambært prakis hevur tikið støðu til, um innsenda uppskotið inniheldur hóskandi og rímuliga býarplanlegging.
Við tí praksis sum Umhvørvisstovan hevur lagt fyri dagin sum góðkennandi myndugleiki, skúgvar ráðið til viks tað rættartrygd, sum lógin gevur borgarum, sum verða raktir av uppskoti til byggisamtykt.
Henda rættartrygd liggur í, at landsstýrið í samband við góðkenningarprosessina skal taka støðu til innihaldið í teimum kærum, sum kommunustýrið ikki tekur til eftirtektar. Løgtingslóg um byggi- og býarskipanir leggur sostatt slett ikki upp til, at talan er um eitt sokallað "legalitetseftirlit". Longri er handan søgan ikki."

## 3. Málslýsing

Saman við klaguni sendi klagarin avrit av kæru, dagfest 1. september 2023, til Umhvørvismálaráðið um avgerð viðvíkjandi umsókn frá Tórshavnar kommunu at broyta økisásetingina B í Kollafirði frá C2 øki til C3 øki.

Við skrivi, dagfest 19. september 2023, hevði Umhvørvismálaráðið sent klagara soljóðandi svar:

> ”Viðvíkjandi kæru um broyting í byggisamtykt fyri Kollafjørð
>
> Víst verður til skriv tykkara til Umhvørvismálaráðið dagfest 1. september 2023, har tit ”heita á Umhvørvismálaráðið um at nokta Tórshavnar kommunu at broyta økisásetingina B frá C2 til C3”.
>
> Landsstýrismaðurin hevur ikki heimild at nokta kommunu at gera ella broyta byggisamtykt, sum lýkur formligu treytirnar í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir (løgtingslógin), og sum er gjørd í samsvari við tær mannagongdir, sum løgtingslógin ásetir.
>
> Umhvørvismálaráðið kann tí ikki ganga áheitan tykkara á møti.
>
> Kommunur hava, sambært løgtingslógini, skyldu og myndugleika til at gera byggisamtyktir. Tá kommunustýrið hevur samtykt uppskot til byggisamtykt, skal hetta leggjast fram til alment eftirlit í 3 vikur smb. § 6, stk. 1 í løgtingslógini. Kommunan skal frammanundan kunngerða, at byggsamtyktin verður løgd fram, nær og hvar. Borgarar kunnu lata kommunustýrinum mótmæli og broytingaruppskot áðrenn 6 vikur eru lidnar frá kunngerðardegnum. Kommunustýrið tekur síðani støðu til innkomin mótmæli og broytingaruppskot og tekur síðani støðu til, um og í hvørjum líki uppskotið til byggisamtykt skal sendast landsstýrismanninum til góðkenningar.
>
> Áðrenn ein byggisamtykt fær rættargildið skal hon góðkennast av avvarðandi landsstýrisfólki. Í hesum sambandi fremur landsstýrisfólkið (stjórnarráðið) eitt rættargildiseftirlit, har kannað verður eftir, um byggisamtyktin lýkur formligu treytirnar í løgtingslógini og um ásetingarnar um almenna hoyring og viðgerð av mótmælum og broytingaruppskotum eru fylgdar. Lýkur byggisamtyktin lógarkrøvini og eru lógarásettu mannagongdirnar fylgdar, verður byggisamtyktin góðkend. Góðkend byggisamtykt fær gildið, tá avvarðandi kommuna hevur kunngjørt hana smb. § 7, stk. 1 í løgtingslógini.”

Við skrivi, dagfest 1. oktober 2023, sendi klagarin soljóðandi viðmerkingar til Umhvørvismálaráðið.

> ”Vísandi til svarskriv frá Umhvørvismálaráðnum, dagfest 19. september 2023,…
> er tað óskiljandi, at myndugleikin ikki gevur tí gætur, at eingin av klagarunum høvdu vitan um, at kommunan hevði í kvittan at gera umrøddu broytingar.
> Okkum kunnugt var eingin í umhvørvinum B, sum yvirhøvur vistu av, at broytingar vóru ávegis.
>
> Í kæruni var hetta gjørt Umhvørvismálaráðnum greitt við hesi orðing:

> Undirritaðu vóru ikki varug við, at TK hevði í kvittan at broyta ásetingina. Um so var, høvdu vit í stundini gjørt TK varuga við, at tað er meiningsleyst at gera D og økið har um leiðir til C3-øki.
> Hetta merkir, at Tórshavnar Kommuna kunnaði serstakliga ónøktandi, tá eingin av teimum, sum broytingin kundi vera viðkomandi fyri, varnaðust hvat Tórshavnar Kommuna hevði í kvittan.

At Umhvørvismálaráðið í skrivinum púra sær burtur frá hesum faktisku umstøðum er sera undranarsamt og verður hetta átalað.
Mannagongdin viðv. kærum er, at býarskipanarnevndin beinanvegin verður kunnað um møguligar kærur, áðrenn nevndin tekur støðu til broytingaruppskot frá kommunala myndugleikanum.
Tað er neyvan hugsandi, at Umhvørvismálaráðið hevur forsømt at senda býarskipanarnevndini kæruna.
Um so kortini skuldi verið, verður heitt á Umhvørvismálaráðið beinanvegin at kunna býarskipanarnevndina um kæruna frá 1. september 2023 og samstundis senda nevndini kæruskrivið, so nevndin kann viðgera og avgreiða málið við støði í faktisku viðurskiftunum B í Kollafirði."

Tann 4. oktober 2023 sendi Umhvørvismálaráðið klagara soljóðandi svar til skriv hansara, dagfest 1. oktober 2023:

"Víst verður til teldupost tygara til Umhvørvismálaráðið dagfestur 01.10.2023.

Í teldupostinum føra tygum fram, at "Tórshavnar Kommuna kunnaði serstakliga ónøktandi" um ætlan at broyta byggisamtyktina fyri Kollafjørð herundir at broyta eitt økið B frá at vera C2-økið til at vera C3-økið.

Í § 6, stk. 1 í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir er soleiðis ásett:

> "Áðrenn uppskot um byggisamtykt verður sent landsstýrismanninum, skal tað verða lagt fram í minsta lagi 3 vikur til alment eftirlits á einum fólki atkomuligum staði. Kommunan skal frammanundan á vanligan hátt kunngera, at byggisamtyktin er framløgd til eftirlits, og kunngerðin skal skila til, hvørt økið tað er, ið uppskotið umfatar. Mótmæli móti uppskotinum, og broytingaruppskot mega verða send kommunustýrinum, áðrenn 6 vikur eru lidnar frá kunngerðardegnum."

Ein partur av eftirkanningini hjá Umhvørvismálaráðnum í sambandi við viðgerð av umsókn um góðkenning av broyting í  byggisamtykt snýr seg um, hvørt ásetingarnar í § 6, stk. 1 eru hildnar. Hóast Umhvørvismálaráðið enn ikki hevur góðkent broyttu byggisamtyktina fyri Kollafjørð, so kann Umhvørvismálaráðið tó staðfesta, at Tórshavnar kommuna, við kunngerð á síðu 26 í Sosialinum frá 19. august 2022, hevur kunngjørt, at "uppskot um endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð liggur frammi á torshavn.fo og í Snarskivuni frá 11. august 2022 til 22. september 2022." Í kunngerðini er mynd og kort, sum vísir, hvørji øki broytingarnar viðvíkja (sí viðfest).

> Umhvørvismálaráðið metir, at Tórshavnar kommuna, við kunngerðini í Sosialinum 19. august 2022, hevur lokið kravið í § 6, stk. 1 í løgtingslóg um býarskipan og byggisamtyktir um at kunngera framløgu av uppskoti til byggisamtykt."

Við skrivi, dagfest 5. oktober 2023, sendi klagarin millum annað hesar viðmerkingar til Umhvørvismálaráðið:

> "Kæran, dagfest 1. september, og viðmerkingin, dagfest 1. oktober 2023, snúðu seg ikki um at Tórshavnar Kommuna ikki hevði fylgt skrivaðu reglunum viðvíkjandi endurskoðanini av byggisamtyktini fyri Kollafjørð.
>
> Í kæruni var gjørt greitt, at tey, sum búgva í økinum B, ikki høvdu verið varug við lýsingina hjá Tórshavnar Kommunu.
>
> Um Tórshavnar Kommuna nýtti nóg glærar mannagongdir, tá lýst varð, munnu vera ymsar meiningar um, tá ongar viðmerkingar komu frá teimum, sum eitt ár seinni vóru varug við ætlanina hjá kommununi B.
>
> Kæran frá 1. september 2023, sum er út móti 3 skrivaðar síður, lýsir mongu ivamálini knýtt eru til avgerð um at leggja D og gamla partin B til C3-øki.
>
> Tað er púra greitt, at vóru kærararnir á sinni varugir við ætlanina at broyta byggisamtyktina, so vildi Tórshavnar Kommuna fingið júst somu viðmerkingar og mótmæli til ætlanina, sum 1. september 2023 vórðu sendar Umhvørvismálaráðnum.
>
> Tí eru svarskrivini frá Umhvørvismálaráðnum 19. september og 4. oktober, undirskrivað av ..., fulltrúa, ikki í samsvari við innihaldið í kæruni 1. september og heldur ikki við svarskrivið til Umhvørvismálaráðið frá undirritaða 1. oktober.
>
> Í svarskrivinum frá Umhvørvismálaráðnum viðger ráðið slettis ikki innihaldið í kæruni, hóast tað er serstakliga viðkomandi fyri umrødda økið, og skal kæran verða løgd fyri býarskipanarnevndina, áðrenn nevndin viðger og avgreiðir málið.
>
> Býarskipanarnevndin skal sostatt kenna faktisku viðurskiftini viðv. ávirkanini av broytingini av byggisamtyktini, áðrenn hon tekur avgerð í málinum. Hetta er tað, sum kærararnir hava biðið Umhvørvismálaráðið at tryggja, so endaliga avgerðin byggir á haldgóða grund. Tað er kjarnin í kæruni."

Tann 30. oktober 2023 sendi Umhvørvismálaráðið klagara soljóðandi viðmerkingar til skriv hansara, dagfest 5. oktober 2023:

> "…Umhvørvismálaráðið hevur áður svarað tygum við skrivum dagfest 19. september og 4. oktober, at ráðið ikki kann ganga kæru tygara á møti.

Í skrivi tygara, sum er endurgivið omanfyri, skriva tygum m.a. at Umhvørvismálaráðið ”viðgerð … slettis ikki innihaldið í kæruni”. Hetta er rætt. Orsøkin til, at Umhvørvismálaráðið ikki viðger innihaldið í kæruni er í fyrsta lagið, at kæran átti at verið send Tórshavnar kommunu í seinasta lagið 22. september 2022. Hetta var kunngjørt m.a. við lýsing í Sosialinum 19. august 2022. Í øðrum lagið eru tey viðurskifti, sum tygum, saman við øðrum, viðgera í kæruni, fevnd av politisku metingarheimildini hjá fólkavalda kommunustýrinum, og støðutakan til slíkar metingar liggur uttanfyri uppgávuna hjá Umhvørvismálaráðnum sum góðkennandi myndugleiki í mun til byggisamtyktir.

Kommunustýrið skal, sambært løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, leggja ætlaðar broytingar í byggisamtyktum fram til alment eftirlit og geva borgarum høvi til at senda kommununi mótmæli ímóti ella broytingaruppskot til ætlaðu broytingina. Sambært lógini skal kommunustýrið viðgera innkomin mótmæli og broytingaruppskot, men kommunustýrið er ikki bundið at fylgja hesum. Endaligu avgerðina um býarskipan og byggisamtykt eigur fólkavalda kommunustýrið, og Umhvørvismálaráðið hvørki kann ella skal taka støðu til politiska/subjektiva innihaldið í býarskipan og byggisamtykt í kommununi.

Tað er kommunustýrið, sum sendir Umhvørvismálaráðnum byggisamtykt til góðkenningar, tá kommunan er liðug við fyriskrivaðu viðgerðina av málinum. Umhvørvismálaráðið eftirkannar síðani, um formligu viðurskiftini í sambandi við kommunalu málsviðgerðina eru í lagi, og eru tey tað, góðkennir Umhvørvismálaráðið byggisamtyktina. Í hesum sambandi kann Umhvørvismálaráðið biðja um ummæli frá býarskipanarnevndini, men avgerðina um góðkenning tekur Umhvørvismálaráðið við støði í egnari málsviðgerð og meting.

Mál um góðkenning av byggisamtyktum vera viðgjørd við støði í tilfari, sum kommunan sendir inn saman við umsóknini um góðkenning. Fær Umhvørvismálaráðið kunnleika til, at tilfarið, ið átti at verið sent við umsókn um góðkenning, ikki er við, vendir Umhvørvismálaráðið sær til kommununa hesum viðvíkjandi.

Umhvørvismálaráðið metir seg við hesum hava svarað nøktandi uppá skrivið, sum tygum, saman við øðrum, sendi Umhvørvismálaráðnum 01.09.2023 og skrivini tygum síðani hava sent Umhvørvismálaráðnum, 01.10.2023 og 05.10.2023. Umhvørvismálaráðið metir soleiðis, at hetta málið er avgreitt, og Umhvørvismálaráðið ger ikki meira við málið.”

Við skrivi, dagfest 5. november 2023, sendi klagarin Umhvørvismálaráðnum soljóðandi viðmerkingar til skrivið, dagfest 30. oktober 2023:

”Viðvíkjandi svar tygara frá 30. oktober 2023, hevur undirritaði hesar viðmerkingar.
…
Her skal skoytast uppí, at undirritaða kunnugt, so var eingin í økinum B, sum visti um ætlanina hjá Tórshavnar Kommunu.
Hugsandi er tí, at Kommunan ikki nýtir nøktandi kunningarmiðlar, tá inntriv verða gjørd, sum ávirka nærumhvørvi hjá borgarunum. Hetta burdi vakt ans hjá Umhvørvismálaráðnum.

Í svarskrivinum frá ... *(ráðnum, mín viðm.)* 30. oktober verður m.a. sagt soleiðis:

> Tað er kommunustýrið, sum sendir Umhvørvismálaráðnum byggisamtykt til góðkenningar, tá kommunan er liðug við fyriskrivaðu viðgerðina av málinum. Umhvørvismálaráðið eftirkannar síðani, um formligu viðurskiftini í sambandi við kommunalu viðurskiftini eru í lagi, og eru tey tað, góðkennir Umhvørvismálaráðið byggisamtyktina. Í hesum sambandi kann Umhvørvismálaráðið biðja um ummæli frá býarskipanarnevndini, men avgerðin um góðkenning tekur Umhvørvismálaráðið við støði í egnari málsviðgerð og meting.

Vísandi til omanfyrinevnda hava kærararnir krav uppá, at kæran verður send býarskipanarnevndini til kunnleika, áðrenn Umhvørvismálaráðið tekur avgerð í málinum.
Umhvørvismálaráðið hevur ikki svarað, um ráðið hevur sent býarskipanarnevndini kæruna.
Umhvørvisráðið hevur skyldu til at svara borgarum á fullgóðan hátt, sum sakliga og við haldgóðum grundgevingum venda sær til myndugleikar um mál, sum eru viðkomandi fyri avgerðir myndugleikin tekur.
… ”

## 4. Viðmerkingar frá myndugleika og klagara

Tann 30. mai 2024 varð klagan send Umhvørvismálaráðnum til ummælis við eini svarfreist á 3 vikur. Samstundis varð Umhvørvismálaráðið biðið um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum um broyting av byggisamtyktini fyri økið B í Kollafirði frá C2 øki til C3 øki, umframt skjalayvirlit.

Tann 31. mai 2024 sendi Umhvørvismálaráðið umboðsmanninum umbidnu skjølini.

Eftir longda svarfreist sendi Umhvørvismálaráðið, tann 21. juni 2024, umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

"...
*Upprunin til klaguna*
Klagan frá A til Løgtingsins umboðsmann hevur støði í kæru, dagfest 01.09.2023, sum A, umboðandi seg sjálvan og tríggjar aðrar borgarar, sendi Umhvørvismálaráðnum við telduposti sama dag, viðvíkjandi umsókn frá Tórshavnar Kommunu at broyta økisásetingina B í Kollafirði frá C2 øki til C3 øki.

Í kæruni gera kærararnir greitt, at teir eru ímóti ávísari broyting í býarskipanini, sum Tórshavnar Býráð hevur samtykt. Kærararnir heita tí á Umhvørvismálaráðið um at nokta Tórshavnar kommunu at gera viðkomandi broyting í býarskipanini.

Málið, sum kært varð um, er í Umhvørvismálaráðnum skrásett sum mál nr. 23/10574. Tórshavnar kommuna sendi Umhvørvismálaráðnum málið til góðkenningar 08.05.2023. Broytingaruppskotið hevði tá ligið frammi til alment eftirlit í tíðarskeiðnum 11.08.-22.09.2022. Umhvørvismálaráðið sendi býarskipanarnevndini málið til ummælis tann

16.05.2023. Býarskipanarnevndin skrivaði álit í málinum 02.10.2023, sum Umhvørvismálaráðið móttók 06.10.2023. Umhvørvismálaráðið góðkendi broytingarnar í býarskipanini fyri Kollafjørð 02.11.2023.

*Generelt um býarskipanir og byggisamtyktir og um heimildir at góðkenna slíkar*
Endamálið við ávikavist býarskipan og byggisamtykt er sambært løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir:

- "at vissa hóskandi og haldgóða skipan fyri byggi-, vega- og havnaviðurskiftum nú og í framtíðini (sbr. § 3, stk. 2) og
- "at vissa hóskandi og haldgóða skipan fyri vega- og byggiviðurskiftum nú og í framtíðini" (sbr. § 5, stk. 2).

Sambært § 4, stk. 3, í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir skulu allar kommunur hava byggisamtykt fyri allar bygdir í kommununi. Sama krav er ikki galdandi viðvíkjandi býarskipan, men tað fylgir av § 4, stk. 3, at kommunur mugu hava eina býarskipan (kort) fyri at kunna avmarka, hvar ymiskar ásetingar í byggisamtyktini hava gildið.

Sambært § 5, stk. 1, í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir skulu reglurnar í byggisamtyktini "verða gjørdar í samljóði við býarskipanina ", um góðkend býarskipan er tøk.

Í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir stendur:

- Í § 1, stk. 1: "landsstýrismaðurin kann, tá ið eitt kommunustýri (býráð ella sóknarstýri) mælir til tess, góðkenna býarskipan fyri hesa kommunu ella ein part av henni. "
- Í § 3, stk. 4, l. pkt.: "Góðkend býarskipan kann verða broytt ella víðkað eftir teim í § 1 ásettu reglum."
- Í § 4, stk. l: "Tá ið eitt kommunustýri mælir til tess, kann landsstýrismaðurin góðkenna eina byggisamtykt fyri hesa kommunu ella part av henni. "
- og í § 5, stk. 7: "Ein góðkend byggisamtykt kann verða broytt ella víðkað við nýggjum og greiniligari reglum viðvíkjandi teim í stk. 4 og 5 umrøddu viðurskiftum eftir reglunum, sum settar eru fyri nýggjar samtyktir. "

*Mannagongdin fyri góðkenning av býarskipanum og byggisamtyktum*
1. Kommunan sendir Umhvørvismálaráðnum umbøn um góðkenning saman við viðkomandi skjølum:

l. l. Úrrit úr gerðabók frá kommunustýrisfundi, har uppskot til býarskipan ella byggissamtykt varð samtykt.

1.2. Avrit av kunngerð um framløgu til alment eftirlit, sum hevur verið lýst í almennum miðlum við upplýsingum um framløguskeið og freist at senda inn mótmæli ella broytingaruppskot.

1.3.Innkomin mótmæli og broytingaruppskot, herundir viðmerkingar frá myndugleikum, stovnum ella borgarum, sum kommunan hevur havt beinleiðis samband við.

l.4. Avrit av beinleiðis skrivum til myndugleikar, stovnar ella borgarar í sambandi við alment eftirlit.

l.5. Úrrit úr gerðabók frá kommunustýrisfundi, har mótmæli, broytingaruppskot og viðmerkingar frá myndugleikum, stovnum ella borgarum, sum kommunan hevur havt beinleiðis samband við, hava verið viðgjørd.
1.6. Avrit av svarum frá kommununi til myndugleikar, stovnar ella borgarar, sum kommunan hevur havt beinleiðis samband við.
1.7. Avrit av svarum frá kommununi til teirra, sum hava latið inn mótmæli og broytingaruppskot, og til myndugleikar, stovnar ella borgarar, sum kommunan hevur havt beinleiðis samband við.

2. Umhvørvismálaráðið kannar eftir, at skjølini 1.1-1.7 eru við umbønini um góðkenning.
3. Umhvørvismálaráðið sendir býarskipanarnevndini umbønina saman við skjølum til ummælis.
4. Býarskipanarnevndin viðger umbønina og skrivar Umhvørvismálaráðnum álit.
5. Umhvørvismálaráðið tekur støðu til umbønina, m.a. við støði í álitinum frá býarskipanarnevndini. Um formligu krøvini til býarskipan ella byggisamtykt eru uppfylt og forskriftin ikki fer út um tað, sum er heimilað í lóg, góðkennir Umhvørvismálaráðið forskriftina.

*Skilmarking av málsrræði hjá ávikavist kommununu og hjá góðkennandi myndugleika*
Sum sæst í mannagongdini, so metir Umhvørvismálaráðið ikki um innihald í skipanarligum metingum, sum rúmast innan fyri lógina, og um fagurfrøðilig val, sum kommunustýrið hevur gjørt í býarskipanini ella byggisamtyktini. Um hesi val eru røtt ella skilagóð, veldst um eygað, sum sær. Hesi val eru, við øðrum orðum, subjektiv ella politisk. Málsræðið at gera slík val liggur hjá fólkavalda kommunustýrinum.

At tað er kommunustýrið, sum hevur hetta málsræðið, og ikki góðkennandi myndugleikin, er ikki ein nýggj fatan hjá Umhvørvismálaráðnum. Í hesum sambandi kann verða víst til mál nr. 11/00248 hjá táverandi Innlendismálaráðnum, har júst spurningurin um markið millum málsræðið hjá kommunustýrinum og málsræðið hjá landsstýrinum verður viðgjørdur. Í ítøkiliga málinum hevði ein meiriluti í býarskipanarnevndini mælt Innlendismálaráðnum frá at góðkenna eina broyting í býarskipanini við hesi grundgeving í áliti dagfest 21.06.2011:

> Staðsetingin [av kirkjuni] er ikki góð. Hetta vísa hópin av argjaborgarum á í tveimum kæruskrivum, og hetta er meirilutin samdur í.
> Talan er um serstakt lendi, tætt upp at einari av størstu áum í landinum. Hon eigur at fáa frið, og áarbakkin liggja opin.
> Viðurskiftini á Argjum er broytt nógv seinastu árini, og konsentratiónin av bústaðum, stovnum og samkomuhúsum er flutt niðaneftir. Skúlin á Hamrinum er feskasta dømi í so mata. Brúgvin, sum fer at koma um Sandá oman fyri kirkjugarðin, ber á sama borðið.
> Rætt er, at atkomuviðurskiftini, sum dentur verður lagdur á, eru í lagi niðri við Sandá, men tey eru eins góð ella betri aðrastaðni íbygdini. Og har verða náttúrukvalitetir ikki á sama hátt órógvaðir.
> Samanumtikið eru onnur vælegnaði øki at byggja kirkju á Argjum, og meirilutin mælir tí frá, at serstaka byggisamtyktin verður góðkend.

Í skrivi til Tórshavnar kommunu, dagfest 08.11.2011, har Innlendismálaráðið ger greitt, at ráðið ikki fer at fylgja meirilutatilmælinum frá býarskipanarnevndini um at sýta fyri at góðkenna broytingina í býarskipanini, stendur m.a. soleiðis:

> lnnlendismálaráðið vil ... gera vart við, at tað í síðsta enda er kommunan, sum avgerð hvussu framtíðar býarplanlegging og harundir eisini staðsetingar av ymiskum slag skal fremjast, so leingi, sum hetta er innan lógarinnar karmar (... ).
> Býarskipanarnevndin vísir í ummæli sínum á, at spurningurin um kirkjan fer at taka seg væl út ella ikki har á staðnum, óivað veldst um eygað sum sær(... ).
> lnnlendismálaráðið tekur undir við hesum sjónarmiðnum, og til spurningin viðvíkjandi hvussu kirkjan fer at taka seg [út] á staðnum, skal ráðið bert viðmerkja, at tað her er talan um eina subjektiva meting, sum í høvuðsheitum hoyrir kommununi, ið er byggi- og býarskipanarmyndugleiki, til. "

Her skal verða skoytt uppí, at lokala friðingarnevndin tann 19.04.2010 hevði tikið avgerð um ikki at friða viðkomandi øki. Hesa avgerð staðfesti Yvirfriðingarnevndin tann 19.09.2011.

Í skrivinum til Tórshavnar kommunu staðfestir Innlendismálaráðið, at avgerðir um, hvat er skynsom og hóskandi býarplanlegging, er undir málsræði kommunustýrisins, so leingi hesar avgerðir eru innan fyri lógarinnar karmar. Um góðkennandi myndugleikin er samdur ella ósamdur við subjektivu metingarnar hjá kommununi, eigur ikki at vera avgerðandi fyri, um ein býarskipan ella byggisamtykt kann vera góðkend ella ikki.

Umhvørvismálaráðið skal her skoyta uppí, at metingin hjá kommunustýrinum er frí, so leingi hon rúmast innan fyri tey krøv og fyrilit, sum lógin ásetur. Tí kann góðkennandi myndugleikin gera av ikki at góðkenna býarskipanir ella byggisamtyktir, sum hann ikki metir rúmast innan fyri lógarinnar krøv og fyrilit.

Í klaguni til Løgtingsins umboðsmann førir klagarin fram, at "landsstýrið má fyrihalda seg til konkreta innihaldið í teimum kærum, sum eru sendar kommununi", og at "landsstýrið ( ... ) skal taka støðu til innihaldið í teimum kærum, sum kommunustýrið ikki tekur til eftirtektar". Klagarin sigur, at Umhvørvismálaráðið við ikki at gera tað "skúgvar ... til viks ta rættartrygd, sum lógin gevur borgarum, sum verða raktir av uppskoti til byggisamtykt. "

Tað er rætt, at Umhvørvismálaráðið ikki viðger ella tekur støðu til innkomin mótmæli, broytingaruppskot ella viðmerkingar, men Umhvørvismálaráðið kannar, um hesi hava verið løgd fyri kommunustýrið til støðutakan. Eisini kannar Umhvørvismálaráðið eftir, um kommunustýrið sakliga og á nøktandi hátt hevur fyrihildið seg til innihaldið í innkomnum mótmælum, broytingaruppskotum ella viðmerkingum, og um kommunustýrið hevur havnað mótmælum ella broytingaruppskotum við nøktandi grundgeving. Hetta verður gjørt fyri at tryggja, at kommunustýrið hevur tikið sínar avgerðir á fult upplýstum grundarlag, og at borgarar og onnur, sum hava sent kommununi mótmæli, broytingaruppskot ella viðmerkingar innan ásetta freist, veruliga eru vorðin hoyrd. At fólk eru vorðin hoyrd, merkir tó ikki neyðturviliga, at teirra sjónarmið hava vunnið frama. Politiska málsræðið liggur, sum áður ført fram, hjá fólkavalda kommunustýrinum, og metingin um, hvat ein býarskipan ella byggisamtykt skal innihalda, byggir í stóran mun á politisk fyrilit hjá

kommunustýrinum, sum tað liggur uttan fyri málsræðið hjá góðkennandi myndugleikanum at taka støðu til, so leingi metingin rúmast innan fyri tey krøv og fyrilit, sum lógin ásetur.

Tað er Umhvørvismálaráðnum greitt, at nevndu avmarkingar í málsræðinum hjá góðkennandi myndugleikanum ikki eru positivt nevndar í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir. Tað er soleiðis hugsandi, at landsstýrisfólkið, við stuðli í løgtingslógini, kundi lagt eitt nú egin fagurfrøðilig atlit til grund fyri at sýta fyri at góðkenna eina býarskipan ella byggisamtykt. Hetta hevur tó tilvitað ikki verið praksis hjá Umhvørvismálaráðnum, m.a. tí at Umhvørvismálaráðið metir vanda vera fyri, at viðgerðin við hesum gerst tilvildarlig og tengd at persónligum tykki hjá skiftandi landsstýrisfólkum. Somuleiðis metir Umhvørvismálaráðið, at slíkur praksis hevði gjørt seg ov nógv inn á kommunala sjálvræði og skert málsræðið hjá kommunustýrinum sum staðbundnum planleggingarmyndugleika.

*Samanumtikið*
Umhvørvismálaráðið tekur ikki undir við sjónarmiðunum hjá klagaranum um, at umsiting Umhvørvismálaráðsins ikki er í samsvari við løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, og at Umhvørvismálaráðið við umsiting síni setir rættartrygdina hjá borgarum í vanda. Tvørturímóti metir Umhvørvismálaráðið, at tað eftirlit, sum ráðið fremur í sambandi við viðgerð av umbønum um góðkenning av býarskipanum og byggisamtyktum, umframt at vera í samsvari við løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, tryggjar, at galdandi býarskipanir og byggisamtyktir eru forskriftir við slíkari dygd, at tað er møguligt og forsvarligt at fyrisita eftir teimum."

Tann 28. juni 2024 vórðu viðmerkingarnar hjá ráðnum sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 6. juli 2024 sendi klagarin umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

"Eg havi við undran lisið viðmerkingarnar frá Umhvørvismálaráðnum. Viðmerkingarnar eru í stríð við galdandi lógartekst. Sum ført fram í mínari kæru ásetur lógin, at landsstýrið skal ráðføra seg við serkøna nevnd, tá byggisamtyktin skal góðkennast. Hetta merkir, at góðkennandi myndugleikin skal fyrihalda seg til innihaldið í einum uppskoti um byggisamtykt v.m. Tað er eingin orsøk til at hava serkøna nevnd, sum skal taka støðu til um formaliteturin í einum máli er í lagi.
Skal enn einaferð gera vart við, at fylgjandi framgongur av § 6: Stk. 2: Innkomið mótmæli og broytingaruppskot, sum kommunustýrið ikki tekur við, skulu fylgja við uppskotinum, tá ið hetta verður sent landsstýrismanninum til góðkenningar.

Hetta kann ikki skiljast á annan hátt enn at landsstýrið má fyrihalda seg til konkreta innihaldið í teimum kærum, sum eru sendar kommununi. Um landsstýrið er ætlað bara at hava eitt legalitetseftirlit, hevði tað verið meiningsleyst at ásett, at kærurnar skula sendast landsstýrinum.

Stk. 3. 1) Landsstýrismaðurin kann, tá ið mett verður, at eitt uppskot eigur at verða broytt í einum ella fleiri førum, áðrenn tað kann verða góðkent, gera av, at kommunustýrið av nýggjum skal leggja uppskotið við teim ætlaðu broytingum fram til alment eftirlits aftaná kunngerð eftir reglunum í stk. 1.

Henda lógargrein ásetur beinleiðis, at Umhvørvisstovan skal viðgera materiella innihaldið í teirri byggisamtykt, sum ráðið fær til góðkenningar. Umhvørvisráðið skal nevniliga meta um innihaldið og kann gera av at broyta uppskotið ella senda tað aftur til kommununa til nýggja viðgerð.

Stk. 4. Somuleiðis kann kommunustýrið, tá ið tað, orsakað av innkomnum mótmælum ella broytingaruppskotum, hevur samtykt at broyta hitt upprunaliga uppskotið, fáa í lag, at uppskotið við hesum broytingum verður framlagt av nýggjum.

Orðaljóðið í hesum reglu sigur eisini beinleiðis, at Umhvørvismálaráðið skal fyrihalda seg til materiella innihaldið í teirri byggisamtykt, sum ráðið skal góðkenna.

Tað er mín fatan, at Umhvørvismálaráðið fullkomuliga hevur misskilt sína uppgávu. Sjálvsagt er tað soleiðis, at kommunustýrið skal taka stig til gerð av byggisamtykt v.m. Ein byggisamtykt kann hinvegin vera eitt stórt inntriv mótvegis borgarum, virkjum v.m og ein byggisamtykt kann eisini ganga ímóti generellum áhugamálum hjá tí almenna, eisini politiskum áhugamálum. Sambært lógartekstinum skal landsstýrið góðkenna eina byggisamtykt. Í hesum liggur sjálvsagt, at landsstýrið skal fyrihalda seg til allar lutir. Í øllum norðurlondum er tað soleiðis, at tað er stjórnin sum setur yvirordnaðu karmarnar fyri býarplanlegging.

Fólkavald kommunustýri skulu halda seg innanfyri teir karmar, sum landssins stjórn ásetur. Í Danmark hevur ráðharrin beinleiðis mótmælisrætt í samband við býarskipanir, eisini við atliti at tryggja, at almenn áhugamál verða vird í samband við byggisamtykt.

Reglurnar í byggi- og býarskipanarlógini leggja als ikki upp til eitt víðkað sjálvsræði til føroyskar kommunur. Reglurnar leggja upp til, at landsstýrið bæði skal hava eftirlit og at landsstýrið eisini skal góðkenna. Í samband við góðkenningina ásetur lógin, at innkomin mótmæli skula sendast til góðkennandi myndugleikan, sum sambært lógartekstinum hevur fulla heimild at nokta umsóknini, krevja broytingar v.m. Hetta liggur langt uttanfyri tað sum Umhvørvismálaráðið kallar eitt “legalitetseftirlit”. Tað er beinleiðis ørkymlandi, at Umhvørvismálaráðið tykist vilja legga alt “politiskt vald” til kommunur í samband við býarplanlegging. Hetta merkir, at atlit til tað almenna og atlit til rættartrygdina hjá borgaranum verða skúgvaði til viks.

Uttan at eg skal fyrihalda meg til innihaldið í øðrum byggimálið, so tykist tað serstakliga merkisvert at hoyra, at Umhvørvismálaráðið í samband við broyting av byggisamtykt á Tvøroyri sigur seg onki kunna gera í samband við eina broyting, har stór verksmiðja verður løgd mitt í bygdum øki, enntá í einum býi. Landsstýrið er sett av einum fólkavaldum løgtingið, sum m.a. skal hava eftirlit við føroyskum kommunum. Landsstýrismaðurin í

> Umhvørvismálum hevur sanniliga eisini skyldu til konkret at fyrihalda seg til innihaldið av teirri býarplanlegging, sum hann skal góðkenna.
>
> At býarplanlegging, sum sannliga kann hava stóra ávirkan á alt samfelagið og tann einstaka borgaran, skal vera latið upp til fólkavalda kommunustýrið einsamalt at gera av, er nýtt fyri mær. Hetta er hvørki samsvarandi orðaljóðinum í lógini ella tí stukturi, sum løgtingslógin leggur upp til. Skal eisini gera vart við, at einasti tryggleikin hjá borgaranum móti tilvildarligari kommunalari býarplanlegging er, at landsstýrið er góðkennandi myndugleiki. Við verandi kommunustrukturi er sannliga tørvur á Umhvørvismálaráði, sum hevur størri ambitiónir enn tað sum ráðið leggur fyri dagin í hesum máli. Støðutakanin hjá Umhvørvismálaráðnum er í veruleikan bara er ein roynd at sleppa sær undan ábyrgd."

Í sambandi við gjøgnumgongd av málinum spurdi umboðsmaðurin, tann 11. juli 2024, Umhvørvismálaráðið, um ráðið sendi býarskipanarnevndini skrivið frá klagara og øðrum, dagfest 1. september 2023, áðrenn nevndin skrivaði álit í málinum.

Í skrivi, dagfest 17. juli 2024, svaraði Umhvørvismálaráðið, at ráðið ikki sendi býarskipanarnevndini skrivið frá klagara og øðrum. Umhvørvismálaráðið metti skrivið at vera eitt mótmæli, sum, sambært § 6, stk. 1, 3 pkt., í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, átti at verið sent Tórshavnar kommunu fyri freistina, sum var 22. september 2022. Umhvørvismálaráðið greiddi millum annað soleiðis frá:

> "...Metti Umhvørvismálaráðið, at upplýsingar vóru í skrivinum, sum vóru heilt nýggjar, ella sum kundu havt munandi týdning fyri støðutakanina hjá kommunustýrinum til broytingina í byggisamtyktini, og sum kommunustýrið ikki longu hevði tikið støðu til, hevði umhvørvismálaráðið havt steðgað viðgerðini og sent kommununi málið aftur."

Í framhaldi av hesum spurdi umboðsmaðurin, tann 15. august 2024, Umhvørvismálaráðið soljóðandi spurning:

> "Í sambandi við at umboðsmaðurin kunnar seg um málið, sóknast umboðsmaðurin eftir viðmerkingunum ella lýsingini av broytingini av byggisamtyktini fyri økið B í Kollafirði frá C2 øki til C3 øki.
> Í viðløgdu skjølunum sæst kortskjal, har C2 og C3 eru merkt við lilla liti, og viðmerking til hesi er:
> "Frá C2 til C3. Broyting í mun til virksemið í økinum."
> Í Býráðssamtyktini sæst ikki lýsing av nevndu broyting.
> Finst onnur lýsing av broytingini fyri økið B í Kollafirði frá C2 øki til C3 øki í tilfarinum?"

Í telduposti, tann 21. august 2024, sendi Umhvørvismálaráðið soljóðandi svar:

> "Umhvørvismálaráðið hevur ikki fingið onnur skjøl, enn tey, sum eru send Løgtingsins umboðsmanni.

> Í býráðssamtyktini verður víst til skjalið Kollafjørður- broytingar, hetta skjal liggur saman við kunngerðini um broyting í byggisamtyktini fyri Kollafjørð, á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu Endurskoðan av serstøku byggisamtyktini fyri Kollafjørð - Tórshavnar kommuna (torshavn.fo)"

Í nevnda skjali "Kollafjørður-broytingar" sæst økið, sum klagan viðvíkur, frámerkt við liti og nummari, og í tilhoyrandi lýsing til skjalið stendur hesin tekstur viðvíkjandi broytingini:

> "Viðmerking C3 … Frá C2 til C3. Broyting í mun til virksemið í økinum."
> Í almennu lýsingini har millum annað nevnda øki er frámerkt við litið, stendur henda lýsing av broytingini:
> "…Tórshavnar býráð samtykti á fundi 22. juni 2022 uppskot um endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð.
> Uppskotið um endurskoðanina fevnir í høvuðsheitum um broytingar og tillagingar av býarskipanini…"

Umboðsmaðurin hevur kunnað seg um býráðssamtyktina og tey skjøl, sum ráðið hevur sent umboðsmanninum, men hevur ikki sæð aðra lýsing av hesi broyting, orsøkini fyri henni ella hvørji viðurskifti hava verið viðgjørd. Í álitinum hjá býarskipanarnevndini, dagfest 2. oktober 2023, verður tó nevnt, at málsviðgeri frá Tórshavnar kommunu hevur verið inni á fundi og greitt nærri frá ætlaðu broytingunum. Umboðsmaðurin hevur ikki sæð notat frá hesi frágreiðing í málsskjølunum, hvørt broytingin frá C2 til C3 varð umrødd á fundinum hjá býarskipanarnevndini.

Tann 6. september 2024 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at av tí at tað ikki varð mett at verða neyðugt við framhaldandi partshoyringum, varð nú farið undir endaligu viðgerðina av hesum málinum.

## 5. Niðurstøða

Viðgerð mín av hesum máli snýr seg um mannagongd og fyrisiting hjá Umhvørvismálaráðnum í sambandi við góðkenning av byggisamtyktum við støði í býarskipanarlógini (løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022).

Málið, sum er upprunin til klaguna, snýr seg um mótmæli frá klagara og øðrum borgarum til broyting av byggisamtykt B í Kollafirði. Mótmælið varð ikki sent Tórshavnar kommunu innan freistina, sum ásett var í almennu lýsingini, men varð beinleiðis sent Umhvørvismálaráðnum eftir, at freistin var farin. Umhvørvismálaráðið viðgjørdi ikki innihaldið í mótmælinum og sendi hvørki býarskipanarnevndini ella Tórshavnar kommunu mótmælið. Innihaldið í mótmælinum hevur sostatt ikki verið undir fyrisitingarligari viðgerð. Umboðsmaðurin fer tí ikki at viðgera klaguna um sjálvt mótmælið um broytingina av byggisamtyktini.

**<u>Krøvini til lýsing av broytingum í byggisamtyktum</u>**

Býarskipanarlógin hevur hesa áseting um kunngerð og framløgu av byggisamtyktum í § 6:

> "Áðrenn uppskot um byggisamtykt verður sent landsstýrismanninum, skal tað verða lagt fram í minsta lagi 3 vikur til alment eftirlits á einum fólki atkomuligum staði. Kommunan skal frammanundan á vanligan hátt kunngera, at byggisamtyktin er framløgd til eftirlits, og kunngerðin skal skila til, hvørt økið tað er, ið uppskotið umfatar. Mótmæli móti uppskotinum, og broytingaruppskot mega verða send kommunustýrinum, áðrenn 6 vikur eru lidnir frá kunngerðardegnum."

Býarskipanarlógin er frá 21. mai 1954 og er síðani broytt í 1995, 2006, 2007, 2009, 2013 og 2022. Einans broytingin í 2013 snúði seg um kunngerð av broytingum. Við lógarbroytingini í 2013 fekk landsstýrismaðurin heimild til í heilt serligum førum at loyva kommunustýrinum at stytta almennu framløgutíðina og mótmælisfreistina. Ásetingin er í § 6, stk. 6 og er soljóðandi:

> "Landsstýrismaðurin kann í heilt serligum førum, eftir áheitan frá kommunustýrinum, taka avgerð um at víkja frá ásettu freistum í stk. 1, soleiðis at framløgutíðin verður ásett til 1 viku og mótmælisfreistin til 1 viku frá kunngerðardegnum. Við áheitanini skal grundgevast fyri, hvørji týðandi samfelagslig og vinnulig atlit tala fyri, at umsóknin kann verða gingin á møti. <u>Verður áheitanin gingin á møti, skal kommunan beinleiðis og persónligt kunna teir borgarar, ið beinleiðis verða ávirkaðir av broytingini, um hetta í seinasta lagi dagin eftir, at frávikið er givið." (*mín undirstriking*)</u>

Í § 6, stk. 6 eru sostatt serlig atlit tikin til týdningin av at kunna beinleiðis og persónligt, teir borgarar, ið beinleiðis verða ávirkaðir av broytingini. Ein slík áseting er ikki galdandi fyri vanligu kunngerðina í § 6, stk. 1.

Tá ið lógin um býarskipanarlógin varð samtykt í 1954, var tað við støði í einum áliti frá 1951 frá eini nevnd, sum landsstýrið hevði sett til tess at gera uppskot um byggilóg og lóg um býarskipanir. Viðmerkingarnar til § 6 vóru hesar:

> "Tá tað er av största týdningi fyri tann einstaka, at hann fær hövi til at gerast kunnugur við tær regulerandi reglur, sum ætlast framdar á ogn hansara, verður skotið upp, at víðgongdur almenningur um uppskot til byggisamtykt verður tryggjaður. Lagt verður í geyma, at 3 mánaða frestin og haraftrat kommunustýrisins viðgerð av kærumálum og tí endaliga uppskotinum, kann gera tað torført at halda 1 árs frestina eftir 4. gr., 2. parti. Bent verður tó á líkindi til at senda inn uppskot til býarlög og byggisamtykt samstundis."

Grundarlagið undir lógini var sostatt "víðgongdur almenningur", og kunningarhættirnir sum í 1954 vóru roknaðir sum "víðgongdir" vórðu ásettir í § 6, stk. 1.
Í grein 6, stk. 1 krevst, at uppskotið skal vera lagt fram til alment eftirlits á einum fólki atkomuligum stað. Í samsvar við hetta verða uppskot vanliga løgd til eftirlits á

kommunuskrivstovum, bygdaráðs- og býráðshúsum kring landið. Frammanundan hesum skal kommunan á ”vanligan hátt” kunngerða, at uppskotið verður lagt til eftirlit.
Í teimum málum umboðsmaðurin er kunnugur við, fer kunning nú fram við lýsing í ymiskum dagbløðum, á tíðindamiðlum á netinum og á heimasíðuni hjá kommununum. Umboðsmanninum kunnugt finst eingin fastur leistur fyri, hvørjum miðlum lýst verður á, men Sosialurin tykist nógv nýttur.

Tíðirnar, tøkni og atferðarmynstur hjá borgarum mugu metast at vera sera nógv broytt, um ikki kollvelt, síðani býarskipanarlógin varð samtykt í 1954.

Í málinum, sum liggur sum grund undir klaguni til umboðsmannin, høvdu fýra borgarar sent kæru um ætlaða broyting av eini byggisamtykt. Kæran varð send Umhvørvismálaráðnum tann 1. september 2023. Ført varð millum annað fram:

> “...Undirritaðu vóru ikki varug við, at Tórshavnar kommuna hevði í kvittan at broyta ásetingina. Um so var, høvdu vit í stundini gjørt Tórshavnar kommunu varuga við, at tað er meiningsleyst at gera D og økið har um leiðir til C3-øki...”

Eisini sæst í telduposti frá klagarunum til ráðið, tann 1. oktober 2023, at:

> “...Okkum kunnugt var eingin í umhvørvinum B, sum yvirhøvur vistu av, at broytingar vóru ávegis...
> ...Hetta merkir, at Tórshavnar Kommuna kunnaði serstakliga ónøktandi, tá eingin av teimum, sum broytingin kundi vera viðkomandi fyri, varnaðist hvat Tórshavnar Kommuna hevði í kvittan...”

Út frá upplýsingunum í málinum hava tríggir av kærarunum adressu í økinum B, og hin síðsti hevur adressu í Kollafirði og áhugað fyri økinum, sum broytta byggisamtyktin viðvíkur. Sambært kæruni, sum send varð til Umhvørvismálaráðið, høvdu hesi ikki fingið kunnleika til ætlaðu broytingina, fyrrenn freistin fyri at lata inn mótmæli var farin.

Eg dugi ikki at síggja, í hvønn mun kunnað hevur verið um ætlanina á borgarafundum ella uppslagstalvum í bygdini. Eg kann bara staðfesta, at hesir borgarar við áhuga fyri økinum, ikki siga seg hava fingið kunning og ikki vistu um eina fyri teir viðkomandi broyting.

Eg haldi, at hetta kundi bent á, at ítøkiligu krøvini í § 6, stk. 1 um kunngerð av ætlaðum broytingum ikki longur livir upp til endamálið um “víðgongdan almenning” nú 70 ár eftir, at lógin varð samtykt.

Eg fari tí at mæla ráðnum til at endurskoða § 6, stk. 1 við tí fyri at eyga at nágreina, hvørji krøv, ið “víðgongdur almenningur” má metast at innibera í 2024.

**Leikluturin hjá býarskipanarnevndini**

Í býarskipanarlógini er ásett ein skipan við eini serligari serkønari nevnd, býarskipanarnevndin, sum er mannað eftir serligum leisti í § 2, stk. 1:

> "Í býarskipanarnevndini sita 5 limir, valdir soleiðis: Landsstýrismaðurin velur 3 limir í nevndina, harímillum formannin, sum skal vera løgfrøðingur. 2 limir skulu vera byggikønir, harav Føroya Kommunufelag velur 1 og Kommunusamskipan Føroya 1."

Í § 2, stk. 2 er henda áseting um starvið hjá býarskipanarnevndini:

> "Landsstýrismaðurin kann biðja býarskipanarnevndina um ummæli í sambandi við viðgerðina av uppskotum til býarskipanir og byggisamtyktir og broytingar í hesum. Landsstýrismaðurin ger starvsskipan fyri býarskipanarnevndina, har m.a. starvsøkið hjá nevndini verður nágreinað."

Talið av limum í býarskipanarnevndini er broytt nakrar ferðir, síðani lógin varð samtykt. Upprunaliga lógin ásetti ikki nágreiniliga, hvat uppgávan hjá býarskipanarnevndini var, men soleiðis stendur í viðmerkingunum til § 2 í álitinum frá 1951:

> "Soleiðis sum skotið er upp at mynda býarskipanarnevndina, er tað ætlanin at fáa í henni umboð bæði fyri landsins og kommunana áhugamál.
> Dentur eigur at verða lagdur á, at samanhangur eigur at vera í arbeiði nevndarinnar, og tí er virkistíð hennara sett til 6 ár."

Í viðmerkingunum til § 1 í álitinum frá 1951 stendur soleiðis um býarskipanarnevndina og leiklut hennara:

> "...Tá býarskipanir mugu legnast eftir landsins framburði yvirhövur, verður tað hildið rímiligt, at góðkenningarvaldið liggur hjá hægsta umsitingarvaldi landsins, landsstýrinum. Tað fær tó undir sær eina býarskipanarnevnd, sum fær líkindi til meinkunnleika til kommunal viðurskifti. Hvussu mikið landsstýrið fer at gera nýtslu av könari hjálp til metingar um innkomin uppskot, ella um tað vil gera nýtslu av tí kunnleika, sum býarskipanarnevndin fær hövi at taka sær, stendur opið"

Við løgtingslóg nr. 80 frá 13. juni 1995 um broyting í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir og um avtøku av løgtingslóg um kommunalan lánigrunn, varð samansetingin og limatalið í býarskipanarnevndini broytt.
Viðmerkingarnar til hesa broyting eru at finna í Løgtingstíðindi 1994. Á síðu 667-668 stendur soleiðis um býarskipanarnevndina:

> "Býarskipanarnevndin er ráðgevandi hjá landsstýrinum í málum viðvíkjandi býarskipan og landsstýrið skal eftir býarskipanarlógini fáa tilmæli frá býarskipanarnevndini, áðrenn landsstýrið góðkennir býarskipanir og byggisamtyktir, sum kommunurnar hava gjørt og samtykt.

> Einasta broyting í mun til galdandi reglur viðvíkjandi samanseting og vali av býarskipanarnevndini er, at í staðin fyri løgtingið skal landsstýrið velja formannin fyri nevndina."

Við hesi lógarbroyting, sum hevði samband við nýggju stýrisskipanarlógina, flutti valið av formanni í býarskipanarnevndini frá løgtinginum til landsstýrið. Ikki sæst onnur tilætlað broyting viðvíkjandi leiklutinum hjá býarskipanarnevndini í hesi lógarbroyting.

Í 2007 var, við løgtingslóg nr. 32 frá 30. apríl 2007 um broyting í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, samtykt broyting í § 2 í lógini um býarskipanir og byggisamtyktir. Talan var um broyting í tali og samanseting av limum í býarskipanarnevndini, men harumframt varð sett inn eitt nýtt stykki 2 viðvíkjandi starvinum hjá býarskipanarnevndini og skylduni hjá landsstýrismanninum í hesum sambandi:

> "Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann biðja býarskipanarnevndina um ummæli í sambandi við viðgerðina av uppskotum til býarskipanir og byggisamtyktir og broytingar í hesum. Landsstýrismaðurin ger starvsskipan fyri býarskipanarnevndina, har m.a. starvsøkið hjá nevndini verður nágreinað."

Í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur millum annað um orsøkina til lógarbroytingina á síðu 2:

> "...Ætlaðu broytingarnar í hesum uppskoti snúgva seg sostatt bara um býarskipanarnevndina. Hesar broytingarnar hava verið eftirlýstar leingi og eru einfaldar og av tekniskum slag. Sambært býarskipanarlógini er sett ein býarskipanarnevnd. Nevndin er <u>ein faklig nevnd (mín undirstriking),</u> sum m.a. skal góðkenna, um landsstýrismaðurin ætlar at áleggja eini kommunu at útvega byggisamtykt fyri kommununa ella part av henni ella at gera broytingar í byggisamtyktini. Týdningarmiklasta uppgávan hjá nevndini, ið er at ummæla uppskot til býarskipanir og byggisamtyktir, sæst tó ikki av lógini..."
>
> "...Broytingarnar, ið uppskotið hevur við sær, eru samanumtikið hesar:
> ...
> - Uppgávan hjá býarskipanarnevndini at ummæla býarskipanir og byggisamtyktir verður staðfest."

Ítøkiliga uppskotið, sum varð samtykt, var grundað á eitt broytingaruppskot, ið varð sent til ummælis hjá býarskipanarnevndini og kommunufeløgunum í 2005. Býarskipanarnevndin førdi millum annað í sínum ummæli fram:

> "Býarskipanarnevndin vísti m.a. á, at tørvur er á starvsskipan fyri arbeiðið hjá nevndini, eins og nevndin vísir á, at normar innan byggi- og planøkið vanta"

Orsakað av viðmerkingunum frá býarskipanarnevndini varð í lógini ásett í § 2, stk. 2, at starvsskipan skal gerast fyri nevndina, har m.a. starvsøkið hjá nevndini verður nágreinað.

Í serligu viðmerkingum til § 2, stk. 2 til 2007 lógina varð hetta skrivað um leiklutin hjá býarskipanarnevndini:

> "Við lógarbroytingini verður staðfest, at býarskipanarnevndin hevur sum uppgávu at ummæla uppskot til býarskipanir og byggisamtyktir, sum landsstýrismaðurin viðger sum góðkennandi myndugleiki.
> Hóast ummælisrætturin verður lógarfestur, so snýr tað seg framvegis um vegleiðandi faklig ummæli (mín undirstriking), ið landsstýrismaðurin ikki er bundin av.
> Ásetingin um, at landsstýrismaðurin ger starvsskipan fyri býarskipanarnevndina er, tikin við eftir áheitan frá býarskipanarnevndini, soleiðis at m.a. starvsøkið hjá nevndini kann verða nágreinað og leiklutur nevndarinnar í býarskipanarhøpi gerst greiðari. Her verður serliga hugsað um reglur um, hvat nevndin skal ella ikki skal fáast við, og hvussu langt nevndin skal fara í arbeiði sínum."

Sambært lógarbroytingini og lógarviðmerkingunum í 2007 skal býarskipanarnevndin sostatt lata landstýrismanninum vegleiðandi faklig ummæli. Hetta samsvarar eftir míni meting við lógarásetingina í § 2 um ta fakligheit, sum skal verða umboðað í býarskipanarnevndini.

Í starvsskipanini, sum ráðið hevur gjørt fyri býarskipanarnevndina, dagfest 13. juni 2022, er uppgávan hjá býarskipanarnevndini við atliti at hóskandi og haldgóðari planlegging, at ummæla, yvirfyri avvarðandi landsstýrismanni, nýggjar og endurskoðaðar byggisamtyktir. Í grein 4 stendur, at býarskipanarnevndin leggur í viðgerðini dent á, at broytingin eins og øll onnur planlegging, er grundað á hóskandi og haldgóða heildarplanlegging. Og býarskipanarnevndin skal sambært § 4 gjøgnumganga møguligar viðmerkingar og kærur og samanbera niðurstøðu kommunustýrisins við egnar niðurstøður.
Sambært § 5 í starvsskipanini sendir kommunan umsókn til ráðið, sum so kannar, at alt tilfarið, ið neyðugt er til viðgerð av málinum, er við í umsóknini. Tilfarið og umsóknin verður síðani send býarskipanarnevndini til ummælis.

Við støði í omanfyri endurgivnu lógarásetingum, lógarviðmerkingum og starvsskipanini er tað mín fatan, at skipanin við býarskipanarnevndini er ein liður í upplýsingarskylduni hjá Umhvørvismálaráðnum í sambandi við viðgerð og góðkenning av uppskotum til býarskipanir og byggisamtyktir.

Sambært lógini og viðmerkingunum er býarskipanarnevndin eftir míni meting ætlað at vera ein faklig nevnd, sum letur landsstýrismanninum faklig ummæli.
Slík ummæli kann býarskipanarnevndin ikki væntast at kunna lata, uttan at fáa nøktandi upplýsingar um tær broytingar sum skulu gerast, um grundarlagið og orsøkina til tær.

**Málsupplýsingarskyldan hjá ráðnum**
Í málinum, sum er grundarlag undir klaguni, var talan um, at borgarar við serligum áhuga og, eftir upplýsingunum at døma, eisini kunnleika til økið, vórðu ov seinir at senda inn mótmæli til Tórshavnar kommunu. Eg gevi mær tó far um, at kæran við mótmælinum varð send ráðnum, áðrenn býarskipanarnevndin hevði gjørt álit sítt, og at klagarin heitti á ráðið um beinanvegin at kunna býarskipanarnevndina um kæruna og senda teimum kæruskrivið.

Klagarin vísti á, at býarskipanarnevndin skuldi kenna faktisku viðurskiftini viðv. ávirkanini av broytingini av byggisamtyktini, áðrenn hon tók avgerð í málinum.
Ráðið sendi tó ikki kæruna til býarskipanarnevndina og hevur í svari til umboðsmannin greitt soleiðis frá:

> "Umhvørvismálaráðið metti skrivið at vera eitt mótmæli, sum sambært § 6, stk. 1, 3. pkt., í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir átti at verið sent Tórshavnar kommunu fyri freistina, sum var 22.09.2022.
> Metti Umhvørvismálaráðið, at upplýsingar vóru í skrivinum, sum vóru heilt nýggjar, ella sum kundu haft munandi týdning fyri støðutakanina hjá kommunustýrinum til broytingina í byggisamtyktini, og sum kommunustýri ikki longu hevði tikið støðu til, hevði umhvørvismálaráðið havt steðgað viðgerðini og sent kommununi málið aftur."

Umboðsmaðurin hevur í hesum sambandi gjøgnumgingið skjølini, sum vóru grundarlag undir málinum hjá Umhvørvismálaráðnum. Grundarlagið sýnist vera eitt kortskjal við tilhoyrandi viðmerking:

> "Frá C2 til C3. Broyting í mun til virksemið í økinum.".

Í býráðssamtyktini sæst ikki nærri lýsing ella umrøða av nevndu broyting.

Við støði í hesi sera stuttu lýsing av broytingini og teimum skjølum ráðið hevur sent mær, undrist eg á grundarlagið undir metingini hjá Umhvørvismálaráðnum um, at kæran ikki innihelt upplýsingar, sum vóru heilt nýggjar ella kundu hava munandi týdning fyri støðutakanina hjá kommunustýrinum.

Málslýsingin, sum ráðið lat býarskipanarnevndini viðvíkjandi nevndu broyting frá C2 til C3, var eftir míni meting sera ivasom. Í hesum sambandi hugsi eg, at býarskipanarnevndin illa kann gera eitt fakligt ummæli av eini broyting, uttan at fáa nøktandi upplýsingar um tær broytingar sum skulu gerast, grundarlagið og orsøkina til tær.

Eg fari ikki at heita á ráðið um at taka undirliggjandi málið uppaftur, vísandi til at mótmælið hjá klagara ikki varð sent Tórshavnar kommunu innan freistina, sum ásett var í almennu

lýsingini. Innihaldið í mótmælinum hevur sostatt ikki verið undir fyrisitingarligari viðgerð, og umboðsmaðurin hevur heldur ikki viðgjørt tað.

Eg fari tó at vísa á, at eg haldi, at málsgongdin í hesum máli lýsir, at mannagongdin hjá ráðnum fyri upplýsing av málum er ivasom. Eg fari tí at heita á ráðið um at endurskoða mannagongd sína fyri upplýsing av málum um broyting av býarskipanum og byggisamtyktum.

**<u>Heimild og skylda hjá landsstýrismanninum í sambandi við broyting av byggisamtyktum</u>**

Í býarskipanarlógini § 4, stk. 1 er henda áseting um heimild landsstýrismansins í sambandi við byggisamtyktir:

> "Tá ið eitt kommunustýri mælir til tess, kann landsstýrismaðurin góðkenna eina byggisamtykt fyri hesa kommunu ella part av henni."

Víðari er ásett í § 4, stk. 4 um heimildir landstýrismansins í sambandi við byggisamtyktir:

> "Landsstýrismaðurin kann annars, um býarskipanarnevndin tekur undir við tí, áleggja eini kommunu at útvega byggisamtyktir fyri kommununa ella part av henni, við tí í § 5, stk. 2, 4 og 6 nevnda innihaldi. Landsstýrismaðurin kann somuleiðis áleggja kommunu at broyta eina góðkenda byggisamtykt. Viðvíkjandi slíkum áleggingum og frama teirra galda reglurnar í § 1, stk. 3, 4, 5 og 6. Umframt kann landsstýrismaðurin seta tær við byggisamtykt umrøddu ætlanir í verk, so umfatandi sum neyðugt er, fyri kostnað kommununar."

Eisini í mun til býarskipanir hevur landsstýrismaðurin í § 1 eina rættiliga víða heimild, har hann kann fáa til vega býarskipanir fyri eina kommunu við undirtøku frá býarskipanarnevndini, um so er at kommunan ikki sjálv ger eftir skyldum og fyriskipanum, sambært lógini.

Ein vanlig orðaljóðstulking av lógini førir, eftir míni meting, til, at landsstýrismaðurin, sambært lógini, hevur rættuliga víðar ræsur í mun til byggisamtyktir. Hann kann góðkenna, hann kann lata vera at góðkenna, og hann kann eisini áleggja kommunu at broyta eina góðkenda byggisamtykt.

Umhvørvismálaráðið hevur hinvegin víst á, at ráðið ikki metir um innihald í skipanarligum metingum, sum rúmast innan fyri lógina, og um fagurfrøðilig val, sum kommunustýrið hevur gjørt í býarskipanini ella byggisamtyktini. Um hesi val eru røtt ella skilagóð, veldst um eygað, sum sær. Hesi val eru, við øðrum orðum, subjektiv ella politisk. Málsræðið at gera slík val liggur, sambært ráðnum, hjá fólkavalda kommunustýrinum.

Ráðið vísir eisini á, at tað er greitt yvir, at nevndu avmarkingar í málsræðinum hjá góðkennandi myndugleikanum ikki eru positivt nevndar í býarskipanarlógini. Tað er soleiðis hugsandi, at landsstýrisfólkið, við stuðli í býarskipanarlógini, kundi lagt eitt nú egin fagurfrøðilig atlit til grund fyri at sýta fyri at góðkenna eina býarskipan ella byggisamtykt. Hetta hevur tó tilvitað ikki verið praksis hjá Umhvørvismálaráðnum, m.a. tí at ráðið metir vanda vera fyri, at viðgerðin við hesum gerst tilvildarlig og tengd at persónligum tykki hjá skiftandi landsstýrisfólkum. Somuleiðis metir ráðið, at slíkur praksis hevði gjørt seg ov nógv inn á kommunala sjálvræðið og skert málsræðið hjá kommunustýrinum sum staðbundnum planleggingarmyndugleika.

Út frá hesum haldi eg, at tað er ikki heilt samsvar millum ásetingarnar í lógini og ta siðvenju, sum ráðið lýsir seg at hava fylgt síðstu árini viðvíkjandi heimild og skyldu hjá landsstýrismanninum í málum um broyting av byggisamtykt.

Umráðandi er tó at geva sær far um, at føroyska samfelagið, landsumsitingin og kommunala umsitingin hevur flutt seg sera nógv síðani 1954. Atlitið hjá ráðnum um ikki at lata málsviðgerð verða tengda at persónligum tykki hjá skiftandi landsstýrisfólkum er als ikki ókent ella óvanligt í løgfrøðiligum kjaki nú á døgum.

Eftir stendur tó, at týdningarmikla lógarøkið um býarskipanir og byggisamtyktir, eftir míni meting, ikki longur kann sigast at verða umsitið eftir lógartekstinum. Samstundis stendur spurningurin um, hvørt gamla lógin er í samsvar við ta rættarfatan og rættartrygd, sum verður væntað í rættarsamfelagnum Føroyum í 2024.
Borgarar hava ikki annan møguleika at fáa síni sjónarmið roynd í málum um byggisamtyktir, enn at senda mótmæli til kommunala myndugleikan, og at hesi síðani verða send ráðnum. Um ætlanin við lógini er, at eingin realitetsviðgerð skal fara fram í ráðnum, eigur hetta, eftir míni meting, at framganga greitt av lógini, so rættarstøða borgarans er greið.

**Samanumtikið**
Vísandi til mína fatan av heimildum, skyldum og uppgávum hjá ávikavist landsstýrismanninum í umhvørvismálum, ráðnum og býarskipanarnevndini, sambært lógini um býarskipanir og byggisamtyktir, fari eg at heita á Umhvørvismálaráðið um at endurskoða sínar mannagongdir og reglugerðir. Ein avmarkandi tulking av heimildunum hjá landsstýrismanninum, har eftirlitið einans viðvíkur legaliteti, er eftir míni meting ikki í samsvar við lógina. Avmarkaða málsupplýsingin hjá ráðnum í undirliggjandi málinum vísir, eftir míni meting, eina ónøktandi mannagongd viðvíkjandi málslýsing, um býarskipanarnevndin skal kunna gera vegleiðandi faklig ummæli til landsstýrismannin.

Eg haldi, at býarskipanarlógin vegna sín aldur, grundleggjandi broytingar í samfelagnum, og ta rættarfatan og rættartrygd, sum verður væntað í rættarsamfelagnum Føroyum í 2024, eigur at verða endurskoðað.

Eg ásanni, at ráðið hevur fylgt síni avmarkandi tulking í fleiri ár, og at mannagongdin í ávísan mun skyldast, at føroyska samfelagið, landsumsitingin og kommunala umsitingin hava flutt seg sera nógv síðani 1954. Eg vil tó vísa á, at um ráðið heldur fast við, at ráðið ikki skal fremja nakra realitetsviðgerð í málum viðvíkjandi broyting av byggisamtyktum, eigur hetta, eftir míni meting, at framganga greitt av lógini. Um so er, mæli eg Umhvørvismálaráðnum til at taka stig til at endurskoða lógina.

Eg fari at biðja Umhvørvismálaráðið lata meg frætta, hvat víðari hendir í málinum.

Av tí at eg meti meg hava rakað við lýti í fyriskipanini hjá Umhvørvismálaráðnum av umsitingini av býarskipanarlógini, fari eg at boða Løgtingi og landsstýriskvinnuni í Umhvørvismálum frá hesum, sambært § 12, stk. 1 í lóg um Løgtingsins umboðsmann.

Av tí at kommunurnar umsita býarskipanir og byggisamtyktir fari eg eisini at boða Kommunufelagnum frá hesi niðurstøðu.

Vinarliga

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður